gult34 cyan34 magenta34 svart34



# HEILSANIR




**Góða mamma & sviger**
Hjartaliga tillukku við 43 ára degnum, alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja Sólbjørn og Eyðbjørg**
Vit elska teg.




**Góða Fanný**
Vit øll ynskja tær hjartaliga tillukku í morgin og alt tað besta, vóna tú fært ein góðan dag.
**Bestu heilsanir ommirnar og abbarnir**



**Góða elskaða mostir!**
Hjartaliga tillukku á 13 ára degnum 11. mai, takk fyri, at tú ert so góð við meg.
**Guðrið**



**Góða elskaða Annika!**
Hjartaliga tillukku á 13 ára degnum 11. mai. Nú ert tú teen.
**Kærar heilsanir mamma og babba**




**Góða elskaða Herdis omma**
Hjartaliga tillukku á 75 ára føðingardegnum 9. mai. Takk fyri alt tú og abbi eru fyri okkum. Eisini ein heilsan til Mariann á 6 ára degnum 10. mai.
**Allarbestu heilsanir Herdis og Torkil**



**Góðu Marian og Bogi (+ Guðrið)**
Hjartaliga tillukku við hjúnabandsdegnum, stóra takk fyri hjálpina.
**Ynskja vit á Spógvavegi**



**Góði Sveinur**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 11. mai.
**Ynskja vit øll, Rúna**



**Góða Elia**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum tann 14. mai, eisini ein heilsan til lítlu systir.
**Kærar heilsanir omman og abbin á Skála**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

## Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á middegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.................................................................................
.................................................................................
.................................................................................
.................................................................................
.................................................................................
.................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: .................................................................
Bústaður: ............................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:

Sosialurin

Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**


gult35 cyan35 magenta35 svart35



# TILTØK

## FØÐINGAR

1. mai fingu Annika Gregoriussen og Leivur Thomsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3750 gr.

3. mai fingu Gerda K. Heinesen og Brian Vágslíð, Skála, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3100 gr.

3. mai fingu Hergerð Geyti og Edmund Debes, Hósvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4100 gr.

3. mai fingu Ivy Jakobsen, Tórshavn og Rúni Poulsen, Nólsoy, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4050 gr.

4. mai fingu Katja og Kristian Dam, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3650 gr.

5. mai fingu Ása Danielsen og Heini Mohr Mortensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3300 gr.

6. mai fingu Sølvi Viola Fredriksen og Frói Jacobsen, Ålesund, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3930 gr.

7. mai fingu Mirjam M. og Kári Vitalis, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3450 gr.

7. mai fingu Malan Petersen og Jóanis Lisberg, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

8. mai fingu Ebba Parker Øre og Bogi Petursson Nielsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4000 gr.

## ANDLÁT

**02. mai**
Jørgina Hansen, Tórshavn, ættað av Eiði, 78 ár.

**04. mai**
Jona Hammer, Tórshavn, ættað frá Norðskála, 82 ár.

**06. mai**
Elisabeth Poulina Maria Jacobsen, vanliga nevnd Mia, Tórshavn, 69 ár.

**08. mai**
Kirstin Nybo í Keypmannahavn, 47 ár.

## 80 ÁR

Jákup Martin Sólbjørg, Klaksvík, verður 80 ár týsdagin 15. mai.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygard. 12. mai: Kári Rasmussen, tlf. 447010
Sunnud. 13. mai: Andreas Petersen, tlf. 441086

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

### Gudstænastur
***Dýri biðidagur 11. mai***
Fámjin: Petur Martin Rasmussen
Havnar kirkja: Sonja Klein kl. 11
Nólsoy: Sverri Steinhólm kl. 12 (sjónvarpað)
Argir: Heri Joensen kl. 11, altargongd
Christianskirkjan: Niels Pauli Danielsen kl. 11
Kl. 18 forbønsgudstænasta
Mikladalur: Hans Eiler Hammer kl. 12, altarg.
Miðvágur: David Johannesen kl. 11
Sandavágur: David Johannesen kl. 18
Eiði: Emil Olsen kl. 11
Kollafjørður: Marjun Bæk kl. 11, konfirmatión
Kvívík: kl. 12, altarg., (skriftarmál kl. 11.50), Martin Restorff Jacobsen
Í Vestmanna, Hósvíkar, Hvalvíkar, Haldórsvíkar og Tjørnuvíkar kirkjum gongur talvan fyri Guds orðs boðan
Elduvík: Uni Næs kl. 12
Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan Dýra biðidag fyri Guds orðs boðan
Sandavágur: Inga Poulsen Dam kl. 11
Søldarfjørður: Meinhard Bjartalíð kl. 11
Leiti: Erland Beder kl. 12
Sandur: Jákup Reinert Hansen kl. 12
***Gudstænastur 4. sunnud. e. páskir***
Tvøroyri: Petur Martin Rasmussen kl. 11
Hvalba: Ólavur Rasmussen kl. 12
Havnar kirkja: Sverri Steinhólm kl. 11
Kaldbak: Sonja Klein kl. 12
Vesturkirkjan: Heri Joensen kl. 11, altargongd
Árnafjørður: Niels Pauli Danielsen kl. 11, altarg.
Christianskirkjan: Hans Eiler Hammer kl. 11
Sandavágur: David Johannesen kl. 11
Norðskála: kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa Emil Olsen
Kollafjørður: Marjun Bæk kl. 11, altargongd
Tjørnuvík: Martin Restorff Jacobsen kl. 12
Hvalvík: Inga Poulsen Dam kl. 11
Fuglafjørður: Uni Næs kl. 11, altargongd
Hellur: Uni Næs kl. 17
Glyvrar: Meinhard Bjartalíð kl. 11, altargongd.
Talvan gongur fyri føroyska bíbliuútgávu
Porkeri: Erland Beder kl. 12

### Útimøti á Hvítanesi
Heimamissiónin hevur útimøti á Hvítanesi sunnukvøldið kl. 20 við sangbólkinum Gittit o.ø.

### Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 bíbliugransking og barnabíbliutími. Evni: Klandursom systkin, kl. 11 gudstænasta. J. V. Danielsen.

### Nebo, Toftir
Sangkórið í Ebenezer hevur sangfund á Svangaskarði sunnudagin.

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Leygardagin kl. 11 útimøti. Sunnudagin kl. 11 møti, major Tjåland talar, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti. Finngerð Djurhuus Olsen talar. Mánadagin kl. 17 skótar.

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti har Jón Joensen av Strondum talar og Sigrid Sivertsen syngur. Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Miu og Magnus Simonsen, Áargeil 15. Øll eru vælkomin.

### Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 orðsinstænasta við kommunión í Kerit. Leygardagin kl. 11.30, sunnudagin kl. 11 orðsinstænasta v/kommunión í Mariukirkjuni, kl. 14 sunnudagsskúli.

### Meinigheitshúsið
Dýra biðidag kl. 18 møti. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti, barnaansing verður. Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Hóskvøldið og sunnukvøldið eingin bíbliutími. Víst verður til ársmøti í Nesvík.
Heimasíða okkara: www.koma.fo

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti. Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 10-12 og kl. 12.45-14 bønarseminar við John Beynon, tilm. við kunningardiskin í Filadelfia ella á tlf. 314828, kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 11 morgunmøti við John Beynon, kl. 16 samkomufundur, kl. 22 útimøti við Filadelfia.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Samkoman Immanuel
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli kl. 17 møti.

### KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Høgna Poulsen, presti. Evni: Dómarabókin.

### Rhema á Hálsi
Týsdagin kl. 17 felags bønarmøti í Filadelfia fyri fundarrøðini hjá Aril Edvardsen á hvítusunnu.
Mikukvøldið kl. 20 evangel. møti.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. barnaklubbur.
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Filadelfia, Sundalagið
Sunnukvøldið kl. 18 sangkvøld við Jens Lisberg Band.

### Ársmøti í Nesvík
Fríggjadagin kl. 11 Gudstænasta í Norðskála kirkju. Evni frá kl. 14 er Andaliga arbeiði millum børn í dag, kl. 19.30 møti við Regin Høgnesen, kl. 22 ungdómskvøld.
Leygardagin kl. 10 upplegg og orðaskifi við Ásbjørn Jacobsen. kl. 14 frágreiðing frá arbeiðinum, kl. 19.30 møti við Knút Larsen, kl. 22 Ungdómskvøld.
Sunnudagin kl. 11 gudstænasta á vanligum støðum, kl. 15 familjumøti við Kristu Magnussen, kl. 18 møti við Thomas Dam.

### Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Oyvind Olsen.
Sunnudagin kl. 17 møti við Martin Olsen, kl. 17 barnamøti. Tú ert vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

### Ørkin, Saltangará
Evangeliskt møti verður í Arbeiðarafelagshúsinum »Hæddini« í Saltangará sunnudagin kl. 17.
Húsmøti verður týsdagin kl. 19 í Saltangará hjá Jonnu & Palla Højgaard, Saltangará.
Verið hjartaliga vælkomin.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

**Úr morgunlestrunum hjá Torgarð presti.**

*Síggið, hvussu miklan kærleika faðirin hevur sýnt okkum, at vit skulu verða kallað Guðs børn; og tað eru vit.*

*1. Jóhs. 1,1*

Tað er júst sum Guds børn, at vit hava lært bønina »faðirvár«. Í øllum tí, sum vit menniskju nevna »okkara« ella »várt« er bønin »faðirvár« eitt av tí, sum verður verandi, so leingi verøldin stendur.

Alt, sum vit nevna »okkara« er skiftandi – komandi og farandi. Lond og fólk hvørva í søguni, heim og hús falla av og farast. Gud er tann, sum verður verandi og er faðir vár um allar ævir. Tá ið áposturin Paulus hugsaði um viðurskifti okkara við Gud og faðirin, tók hann einastaðni til um okkum menniskju: »Vit eru starvsfelagar Guds«. Og eru vit starvsfelagar Guds, eru vit eisini starvsfelagar hjá hvørjum øðrum, og tí leggur ápostulin eisini afturat: »Starvsfelagar at gleðini hjá hvørjum øðrum«.

Og tá ið talan er um gleðina, kunnu vit ikki annað enn hava tað í huga, at »faðirvár« lika so væl sum alt annað, ið boðað verður í bíbliuni, er ein gleðiboðskapur, eitt evangelium um hann, sum hevur lært okkum »faðirvár«, hevur lært okkum at rópa Gud faðir. Hann sum í gjár og í dag og um allar ævir er hin sami.

Tað hevur verið sagt, at tað at rópa Gud faðir er tað léttasta av øllum. Sjálvt eitt barn kann læra tað, áðrenn tað lærir at skyna á klokkuni ella at telja dagarnar.

Men tað kann eisini verða sagt, at tað er tað torførasta at læra av øllum. Og tað kemur serstsakliga fyri, tá ið vit eru tilkomin og so væl at okkum komin, at vit halda okkum ikki hava fyri neyðini at biðja nakran um nakað og allarminst ein fjaran Gud í himlinum.

Men evangeliið boðar okkum, at tað er tann størsti kærleikin, sum er okkum fyri, at vit hava fingið loyvi til at kalla Gud faðir, og at tað er tann størsti heiður, okkum er sýndur, at hann vil kalla okkum børn síni.

Tað er hetta, sum ápostulin Jóhannes skrivar á gamalsaldri: »Síggið, hvussu miklan kærleika, faðirin hevur sýnt okkum, at vit skulu verða kallað Guds børn; og tað eru vit«.